Nýggj snið - serlig dygd




Ring og fá eitt maskinprát tlf. 422394 - 284792 - fax 422395

Fígging heilt niður í 3,75% rentu fæst

O. K. HEILSØLA & MASKINUR

430 Hvalvík - Tlf. 422394


# Ársaðalfundur

Nevndin í P/F Trygd boðar við hesum til ársaðalfund á Hotel Hafnia, Tórshavn

**mikudagin 9. februar 2000 kl. 15.00**

Dagsskráin fyri aðalfundin verður henda:

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í farna ári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar.
3. Avgerð um nýtslu av avlopi.
4. Uppskot frá nevndini um nýtslu av serligum grunni.

   Í sambandi við kapitallækking í 1999 burturlegði aðalfundurin eftir reglunum í partafelagslógini 23,2 mió. kr. í ein serligan grunn.

   Nevndin setur fram uppskot um, at grunnurin verður avtikin, og at upphæddin verður flutt til tiltakspening.
5. Val av nevndarlimum.
6. Val av grannskoðarum.
7. Ymiskt.

Ársroknskapurin við grannskoðanaráteknіng og ársfrágreiðingin liggja frammi á skrivstovu felagsins í Tórsgøtu 16, Tórshavn.

Atgongumerki til aðalfundin verða útflýggjað partaeigarunum á skrivstovuni hjá Trygd til og við fríggjadagin tann 4. februar 2000.

Tórshavn, tann 27. januar 2000

NEVNDIN

PARTAFELAGIÐ TRYGD


FISKARÍMESSA

AQUA CULTURE INTERNATIONAL 2000 March 30,31 - April 1 GLASGOW -SCOTLAND

FISHING 2000 March 30,31 - April 1 GLASGOW - SCOTLAND

**Beinleiðis flogferð til/frá Glasgow**
Fráferð úr Vágum mikukvøld 29. mar. kl. 17.30
Heimaftur leygarkvøld 01. apr. kl. 19.30

**Kostnaður fyri hvønn**
Kr. 8.355 á einkultkamari
Kr. 7.280 á dupultkamari

**Innivist kann fáast á**
Post House Hotel ella Hotel Holliday Inn, sum liggja í miðbýnum

**Íroknað**
Flogferð og ferðagjald
Bussflutningur í Glasgow til/frá gistingarhúsinum
Gisting í 3 nætur við morgunmati

FLOGFELAG FØROYA

Tel. + 298 31 10 25 ·Fax +298 31 86 70
E-mail: travel@ff.fo · www.ff.fo
Flogvøllurin: Tel. +298 33 27 55 · Fax +298 33 22 80
E-mail: airport@ff.fo · www.ff.fo





GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað



Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo


Halt sosialin



# Skattalætti er skaðiligur

*Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, heldur tað verða ábyrgdarleyst at lække skattatrýsið í løtuni*

EYÐUN KLAKSTEIN

Skattalætti nú kann hava skaðiliga ávirkan á búskapin.

Hetta sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður, eftir at tingmenn hjá Fólkaflokkinum hava funnið hvassliga at honum, tí hann ikki vil lætta skattatrýstið.

Í samgonguskjalinum hava flokkarnir millum annað avtalað, at skatta- og avgjaldstrýstið á húsarhald og vinnu skal lækkast, at skattafría grundupphæddin skal hækkast og at arbeiðið fram móti eini bruttoskattaskipan skal halda fram.

Óli Breckmann og Bjarni Djurholm, tingmenn fyri Fólkaflokkin, halda, at Karsten Hansen einki ger fyri føra hesi mál út í lívið, og á tingfuninum týsdagin fekk hetta serliga Óla Breckmann at taka harðliga til orðanna móti Karsteni Hansen.

Í gjár endurtók Bjarni Djurholm, formaður í fíggjarnevndini hjá løgtinginum, atfinningarnar móti Karsteni Hansen.

– Vit vóru sera fegin um at fáa hesi mál við í samgonguskjalið, men tað er als ikki nøktandi, at landsstýrismaðurin einki ger við málini, segði Bjarni Djurholm millum annað við Sosialin í gjár.

## Ferðin á búskapin er ov stór

Tað hevur verið trupult at fingið fatur á landsstýrismanninum við fíggjarmálinum seinastu vikuna, men niðanfyri prenta vit eina viðmerking frá honum.

Har sigur Karsten Hansen, at Óli Breckmann og Bjarni Djurholm ikki skilja týdningin av skattapolitikki.

– Ein skattlætti hevði sett meira ferð á búskapin, og tá trupulleikin í dag er, at í meira lagi av ferð longu er á búskapi okkara, og tí hevði ein skattalætti nú kunna havt skaðiliga ávirkan á búskapin, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður.

Hann heldur, at tingmenninir hjá Fólkaflokkinum gloyma, at í samgonguskjalinum stendur skrivað, at ein varin og ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur skal rekast.

Og sambært landsstýrismanninum merkir ein varin og ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur ikki, at skattalætti skal latast nú.

– Ístaðin skal peningur leggja til síðis, tá nógv ferð er á búskapinum, og so kunnu vit veita skattalætta, tá tíðirnar verða verri.

Karsten Hansen sigur, at øll tilmæli frá óheftum búskaparfrøðingum seinastu tíðina hava mælt frá at veita skattalætta, men heldur tvørturímóti at tátta enn meira í.

Hetta verður endurtikið í nýggju frágreiðingini hjá Búskaparráðnum, sum kom í gjár.

## Okkurt er á veg

Men hóast landsstýrismaðurin ikki heldur tað verða ráðiligt við skattalætta nú, váttar hann, at arbeitt verður við skattalættum til húsarhald og vinnu.

Í blaðnum í gjár segði Bjarni Djurholm seg stúra fyri, at pappírsleysa avtalan millum samgonguflokkarnar um lætta partafelagsskattin, ikki verður førd út í lívið í hesi tingsetuni.

Og tann óttin er ikki ógrundaður, tí Karsten Hansen sigur í síni viðmerking, at uppskotið um at lækka partafelagsskatin verður lagt fyri tingið í heyst.

Hann sigur, at arbeitt verður við at lækka partafelagsskattin, men at hetta er ein liður í eini størri skattabroyting, sum Fíggjarmálastýrið og Toll- og Skattstovan arbeiða við í tøttum samstarvi við vinnuna.

Og landsstýrismaðurin kemur heldur ikki við nøkrum lyfti um, nær skattalættin upp á 40 milliónir krónur, sum samgonguflokkarnir hava avtalað skal latast ístaðinfyri at gjalda fyri endurnýggjan av fiskiflotanum, verður latin.

Í løtuni verður arbeitt við hesum málið, sigur Karsten Hansen.

Hann heldur, at pástandurin hjá tingmonnunum hjá Fólkaflokkinum um, at einki hendir á skattaøkinum, eru ógrundaðir.



*Karsten Hansen sigur, at øll tilmæli frá óheftum búskaparfrøðingum seinastu tíðina hava mælt frá at veita skattalætta, men heldur tvørturímóti at tátta enn meira í*

## Viðmerking:

# Óli og Bjarni skilja ikki týdningin av skattapolitikk

**Skattlætti**
Óli Breckmann og Bjarni Djurholm leggja meg undir ikki at halda samgonguskjalið har ásett er, at skattatrýstið skal lækkast.

Lat ongan iva verða um, at bæði eg og Tjóðveldisflokkurin taka fult undir við, at skattatrýstið skal lækka.

Óli og Bjarni gloyma tó, at tað aðrastaðni í samgonguskjalinum stendur at: “rikin verður ein varin og ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur”.

Sum øllum kunnugt, setur ein skattlætti meira fer á búskapin, og tá trupulleikin í dag er, at tað í løtuni er í meira lagi av fer á búskapi okkara, má roknast við, at ein skattalætti júst nú kann fáa skaðiliga ávirkan á búskapin.

Ein ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur merkir m. a., at tá nógv fer er á búskapinum, verður peningur lagdur til síðis (sum gjørt verður í dag) og tá tíðirnar aftur verða verri, verður skattlætti veittur.

**Caragata**
Fólkafloksmenn sendu boð eftir búskaparfrøðingi úr New Zealandi nevndur Caragata, ivaleyst við tí fyri eyga at fáa eitt tilmæli um at lækka skattin beinanvegin.

Tá frágreiðingin hjá Caragata kom, var einki tilmæli um nakra generella lækking av skattinum beinanvegin. Tað sum Caragata mælti til at gera beinanvegin var at lækka partafelagsskattin úr 27 % niður í 20 %. Hetta var júst tað sama sum Fíggjarmálastýrið var farið at fyrireika longu áðrenn Caragata kom uppá tal.

Møgiliga er tað hetta, ið skapar frustratiónir hjá Óla og Bjarna.

Annars kann eg nevna, at øll tilmæli frá óheftum búskaparfrøðingum seinastutíðina hava mælt til ikki at veita skattalætta, men tvørtur ímóti at tátta í skattliga.

**Vinnuskattareformur**
Sum nevnt arbeiða vit við at lækka partafelagsskattin. Hetta er bert eitt lið í einum størri vinnuskattareformi, sum Fíggjarmálastýrið og Toll-og Skattstovan arbeiða við í tøttum samstarvi við vinnuna. Hetta arbeiði verður gjørt út frá hesum meginreglum:

- Skatta- og avgjaldsskipanirnar skulu virka eggjandi fyri vinnuligt virksemi
- Skipaninar mugu ikki virka vinnuliga avlagandi
- Skipaninar skulu verða léttar at umsita hjá vinnu og umsiting.

Hetta arbeiði verður liðugt til heystar.

40 milliónir í skattalætta
Í november mánað var politisk avtala gjørd um, at tær 40 milliónirnar ið settar vóru av til endurnýggjan av fiskiflotanum, í staðin skuldi nýtast til skattalætta.

Eg kann upplýsa, at í løtuni verður arbeitt við at fyrireika henda skattalætta.

**Niðustøða**
Pástandirnir hjá Óla Breckman og Bjarna Djurholm um at einki hendir á skattaøkinum hava soleiðis ikki hald í veruleikanum. Størsti trupulleikin er helst, at teir ikki duga at síggja, at skattapolitikkur er ein partur av samlaða búskaparpolitikkinum.

**Karsten Hansen**
**landsstýrismaður**


Konsertir í Norðurlandahúsinum
Leygardagin 5. februar

kl. 16.00
Jóhannes Andreasen, klaver
og Einar Jóhansson, klarinet

&

kl. 19.30
Hanus og Aldubáran

Eitt atgongumerki til báðar konsertinar
Kostnaður 120 kr.

Norðurlanda HÚSIÐ í Føroyum
Tlf. 317900